# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Eg havi verið errin av at bera liðskiparabindið í HB*
*Jákup á Borg*

# Jákup missir armbindið



*Jákup á Borg kom til HB í 2004. Síðani í fjør hevur hann verið liðskipari hjá felagnum, men tað heitið misti hann í gjár*

**Úrslitini hjá HB hava ikki verið nøkrandi seinastu vikurnar. Rættiliga óvæntað fær hetta nú ta avleiðing, at Jákup á Borg missir liðskiparabindið**

Fótbóltur
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá HB komandi vikuskiftið tekur ímóti NSÍ, verður tað ikki Jákup á Borg, sum fer at taka ímóti mótstøðumonnunum. Jákup hevur annars verið liðskipari hjá HB í fjør og higar til í ár, men tað heitið misti hann í gjárkvøldið.

Tá fekk hann nevnliga boð frá Rúna Nolsøe um, at hesin hevði valt Fróða Benjaminsen til álitissessin. Ein avgerð, sum venjarin váttar, men sum hann ikki vil gera nakrar serligar viðmerkingar til.

- Talan er um eina justering, sum vit hava gjørt innanhýsis, og eg haldi ikki, at tað er nakað, sum eg fari at viðgera í fjølmiðlunum, er einasta viðmerkingin, sum venjarin hevur til spurningin.

Jákup á Borg vil heldur ikki sjálvur gera tær heilt stóru viðmerkingarnar til málið.

- Sjálvandi eri eg vónbrotin. At vera liðskipari er ein heiður, og eg havi verið errin av at bera liðskiparabindið í HB. Tí kann eg ikki siga, at eg eri samdur í avgerðini hjá venjaranum. Men hinvegin er fótbóltur eitt liðspæl, og kann hetta hjálpa til at fáa glið á hjá okkum, so má tað vera tað, sigur Jákup á Borg.

### Hálvt ár í felagnum

Fyri uttanfyristandandi kann tað tó undra, at venjarin hevur valt hetta sum ein part av loysnini upp á trupulleikarnar á HB.

Tað kann vera, at Jákup á Borg ikki hevur verið so sjónligur í ár, sum hann annars hevur verið. Men bæði á og uttan fyri vøllin er hann vanliga ein av spælarunum, sum gongur á odda. Og tað man neyvan vera so, at hann einsamallur hevur verið atvoldin til laku gongdina hjá HB seinasta mánaðin ella so.

Eitt kritik-punkt frá tí meira inkerneraða partinum av HB-viðhaldsfólkunum hevur tó verið, at tað líktist ongum, at ein fyrrverandi B36'ari skuldi bera liðskiparabindið í felagnum. Møguliga hevur talan verið um trýst á venjaranum í so máta, men er hetta argumentið, so vildi tað verið meira upplagt, um til dømis verandi varaliðskiparin, Hans á Lag, ella Andrew av Fløtum varð valdur sum nýggjur liðskipari. Eingin ivi er um, at Fróði Benjaminsen er ein av spælarunum, sum gongur á odda, tá stig skulu stríðast heim, og sum spælari er hann ein náttúrligur leiðari á vøllinum. Men enn hevur hann ikki meira enn lítið hálvt ár á baki í HB, og tá er hampuliga óvanligt, at ein spælari longu verður valdur at bera liðskiparabindið.

Men møguliga er hugsanin handan hetta, at nýggir kustar feiga best. Og sunnudagin fæst so at vita, um nýggi kusturin hjá HB er betri í so máta.

# Advocaat móti sínum egnu

**Hollendski venjarin hjá Zenith Petersborg sigur seg framvegis vera fjeppara hjá Glasgow Rangers. Í kvøld spæla liðini finalu í UEFA Cup-kappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan verður avgjørt ikki um finaluna, sum fólk flest roknaðu við, tá russiska Zenit Petersborg og skotska Glasgow Rangers renna inn á vøllinum á City of Manchester Stadium í Onglandi.

Men í finaluni bastu tey bæði feløgini ávikavist Bayern Munchen og Fiorentina, og so hevði tað ikki tað stóra at siga, hvør varð metur sum favorittur undan teimum uppgerðunum.

Hóast UEFA Cup-kappingin í stóran mun stendur í skugganum av Champions League, so er hampuliga stórt fokus á hollendska venjaranum hjá Zenit, Dick Advocaat. Advocaat, sum eitt skifti var hollendskur landsliðsvenjari, hevur nevnliga eisini verið venjari hjá Glasgow Rangers, og tað er ein tíð, sum hann ongan tíð fer at gloyma.

- Eg havi sagt tað áður. Eg var í felagnum í hálvtfimta ár, og tað var ein ógloymandi tíð. Eina ferð Rangers – altíð Rangers, er eitt orðafelli, sum enn hóskar til mín, sigur Advocaat við enska SkySport.

Undan dystinum hevur Walther Smith, venjari hjá Glasgow, fýlst at skotska fótbóltssambandinum, tí tað ikki hevur borið til at flyta dystir í heimligu kappingini. Nakað, sum ber við sær, at Rangers skal spæla sjey tíðandi dystir í 18 dagar.

Í Russlandi hevur fótbóltssambandið hinvegin flutt dystir, so Zenit hevur best møguligu fyrireikingarnar, og tað er Advocaat sjálvandi nøgdur um.

- Vinna vit, so siga teir helst, at teir vóru troyttir. Tapa vit, so sigur skotska fótbóltssambandið hinvegin, at teir høvdu rætt, so eg veit ikki, hvussu hetta fer at spæla av. Men sjálvur haldi eg, at vit kanska hava ein lítlan fyrimun í fyrireikingunum sigur Advocaat.

Finalan verður spæld í kvøld og kann síggjast beinleiðis á 3+.